# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B  P.O.Box 1134  FO-110 Tórshavn  Faroe Islands
Tlf. +298 317811  Fax +298 314489  E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


*Skrásetingar nr.:*

**R-C002-2**

# Reglugerð um persónlyfting við gaffiltrukki.

Sambært løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum, § 17, stk. 2, hevur Landsstýrið heimilað Arbeiðseftirlitinum at fyriseta hesa reglugerð.

## KAPITTUL 1.

***Lýsing*.**

**§ 1.** Gaffiltrukkur er bert innrættaður til at lyfta góðs við. Tað er tó loyvt at lyfta persónar í góðkendari arbeiðskurv á gaffiltrukki, tá fylgjandi treytir eru loknar:

## KAPITTUL 2.

***Arbeiði*.**

**§ 2.** Persónlyfting má bert gerast av og á til lættari arbeiði, so sum skifting av ljósperum og -rørum, lættari uppsetingararbeiði, reingerðing, málaraarbeiði og líkn.

## KAPITTUL 3.

***Trukkurin*.**

**§ 3.** Lyftievni hjá trukkinum skal verða í minsta lagi 4 ferðir vektina av arbeiðskurv við hægst loyvdu last.

**Stk. 2**. Tjúktin av gaflunum má ongastaðni verða slitin meira enn 5%.

**Stk. 3.** Gaffiltrukkur av mótvektsslagnum skal kunna lyfta í minsta lagi 1.800 kg og hava eina sporvídd uppá minst 0,9 metur.


***Lógarheimild:***
Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E015-1 um innrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.

| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
|---|---|
| **5. apríl 1994** | **25. januar 1995** |


**Stk. 4.** Onnur sløg av trukkum, har tyngdardepilin er innanfyri stuðulsflatuna, skal kunna lyfta í minsta lagi 1.200 kg og eginvektin av trukkinum skal verða í minsta lagi 2.000 kg.

**Stk. 5.** Um brot kemur á oljutrýstskipanina, má fallferðin ikki koma upp um 0,5 m/sek.

**Stk. 6.** Trukkurin skal hava malandi ávaringarljós.

## KAPITTUL 4.

***Arbeiðskurv*.**

**§ 4.** Samlaða vektin av kurvini við fullari last má í mesta lagi verða 500 kg. Í mesta lagi 2 persónar mugu lyftast í senn.

**Stk. 2.** Gólvflatan má í mesta lagi verða 1,2 x 1,2 m og ikki minni enn 0,6 $m^2$ fyri hvønn persón. Gólvið skal verða glíðitrygt og tilgjørt úr plátutilfari (ikki timbur), ella t.d. úr tættmeskaðum stálneti (meskavídd hægst 15 mm).

**Stk. 3.** Kurvin skal hava ein 10 cm høgan tættan fótlista á øllum síðum. Síðurnar av kurvini kunna verða gjørdar úr sama tilfari sum gólvið. Síðan inn móti mastrini skal verða í minsta lagi 1,9 m høg og minst líka so breið sum masturin. Hinar síðurnar á kurvini skulu verða í minsta lagi 1 m høgar og hond- og knælisti skal verða allan vegin runt. Fótlistin skal verða gul/svart strípután uttan. Hondlistin skal verða 10 cm innanfyri og 10 cm omanfyri kantin á síðunum.
Portrið í gyrðingini má ikki kunna opnast úteftir og skal hava sjálvvirkandi lás.

**Stk. 4**. Kurvin má bert kunna setast á trukkin í rættari støðu og skal læsast til gaflarnar við tveimum lásiskipanum, sum skal kunna síggjast frá kurvini. Botnurin av kurvini má í mesta lagi verða 100 mm yvir ovaru flatu av gaflunum.

**Stk. 5.** Hólkar ella lykkjur fyri gaflarnar skulu ikki verða meira enn 150 mm innan fyri síðunum av kurvini. Innanmát teirra má ikki vera meira enn 50 mm størri enn breidd gaflanna og hæddin í mesta lagi 20 mm meira enn tjúkt gaflanna.

**Stk. 6.** Kurvin skal hava eitt skelti, har bókstavirnir í minsta lagi eru 20 mm høgir.

Á kurvini til tveir persónar skal teksturin verða:
*"Mesta last 2 persónar og ... kg ella 1 persónur og ... kg."*

Á kurvini til ein persón skal teksturin verða:
*"Mesta last 1 persónur og ... kg."*

**Stk. 7.** Hjá stýriskipanini skal eitt skelti verða við teimum neyðugu nýtsluleiðbeiningunum.

Tann loddrætta rørslan av kurvini skal kunna stýrast:
1) antin frá stýriskipanini í kurvini, innrættað soleiðis, at rørslan steðgar, tá ein sleppur hesari, og sum ger, at stýringin frá føraraplássinum á trukkinum verður avbrotin,
2) ella frá tí vanligu stýriskipanini á føraraplássinum, men bert tá ein skipan í kurvini er ávirkað.

Stk. 8. Stýriskipanin skal verða soleiðis sett upp, at ein ikki av óvart kann koma at ávirka hana.

## KAPITTUL 5.

***Nýtsla***.

**§ 5.** Persónlyfting við trukki má bert gerast við góðkendari kurv.

**Stk. 2.** Trukkførarin skal hava trukkførarauprógv - sí kunngerð nr. K-C002-1 frá 18. juli 1985 um loyvisbræv at koyra gaffiltrukk.

**Stk. 3.** Har fólk verða lyft, skal trukkurin standa á vatnrøttum og burðartryggum undirlagi.

**Stk. 4.** Áðrenn lyft verður skal útgerðin og arbeiðsumstøðurnar kannast av føraranum og tí ella teimum sum skulu lyftast við kurvini.

**Stk. 5.** Tá kurvin er lyft hægri enn 1 m yvir lendi skal trukkurin verða bremsaður, ávaringarljósini tendraði og neyðug sperring sett upp.

**Stk. 6.** Koyring við fólki í kurvini skal gerast við størsta varsemi og bert, tá kurvin er lægri enn 1 m yvir koyribreytina.

**Stk. 7.** Persónar mugu ikki vera - ella ferðast undir kurvini.

**Stk. 8.** Lyftihæddin má í mesta lagi verða 5 m. Um hægri lyft hendingaferð er neyðugt, skal masturin mekaniskt læsast til trukkin.

## KAPITTUL 6.

***Sýn og eftirlit***.

**§ 6.** Nýggj kurv skal sýnast og roynast av Arbeiðseftirlitinum, áðrenn hon verður tikin í nýtslu. Lýkur hon galdandi treytir, verður hon skrásett og góðkend.

**Stk. 2**. Kurvin skal verða undir støðugum eftirliti og skal sýnast eina ferð í hvørjum álmanakkaári. Fyri nýtt og tíðarásett sýn og roynd, letur eigarin eitt gjald, ið er ásett av Landsstýrinum.

## KAPITTUL 7.

***Ung undir 17 ár***.

**§ 7.** Ung fólk undir 17 ár mugu ikki nýtast til arbeiði í kurv, tá arbeiðshæddin er meira enn 5 m yvir lendið.

## KAPITTUL 8.

***Gildi fyri reglugerðina***.

**§ 8.** Hendan reglugerð kemur í gildi 1. mai 1994.

**Arbeiðseftirlitið**, 5. apríl 1994.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)